gult26 cyan26 magenta26 svart26



## VIÐMERKINGAR

# Samferðslan – útbygging

**Marjus Dam,**
*løgtingsmaður*



**Eg takið undir við bestu loysn til suðuroyingar - eins og føstum sambandi til Klaksvíkar.**

Sambandsflokkurin er ein av fáu flokkunum á tingi, ið av heilum hjarta kann taka undir við tí útbygging, ið ætlanin er at fremja innan samferðsluøki okkara.

**Sandoyarskipið:**
Fyrst av øllum fari eg at ynskja sandoyingum tillukku við nýggja og stásiliga skipi teirra. Vónandi kemur tað í sigling beinanvegin og fer at roynast væl. Vit í Sambandsflokkinum frøast um hetta nýggja og stásiliga far.

**Suðuroyarskipið:**
Nýtt suðuroyarskip. Vit í Sambandsflokkinum taka undir við hesi ætlan - ið er til gagn fyri suðuroyingar, ið hava verið fyri vanbýti nú í fleiri ár. Suðuroyingar skulu hava tað skip, ið teir meta er tað besta. Ongin annar skal koma at leggja teimum fótonglar í vegin, so næst ella triðja besta loysnin verður úrslitið. Sambandsflokkurin vil, at suðuroyingar skulu hava tað bestu loysnina. Tað besta Suðuroyarskipið.

Tí er tað gott at hoyra, at Føroya Landstýrið, eftir at hava ivast í langa tíð, nú tekur undir við okkara niðurstøðu.

**Leirvíksfjørður:**
Vit eru fleiri, ið vóna, at kanningarnar undir Leirvíksfjørð fara at gangast væl og sína eitt gott úrslit, so farast kann undir at gera fast samband undir Leirvíksfjørð skjótast møguligt. Helst so skjótt, at borurin kann flytast norður frá Vestmannasundi beinanvegin skotið er ígjøgnum har. At norðoyingar kunnu rokna við Sambandsflokkinum, man vera uttan nakran iva.

**Vestmannasund og Gásadalur:**
Tað gongur sum eftir ánni undir Vestmannasundi og um stutta tíð verður eisini farið undir at gera Gásadals tunnilin. Tunnilin til Gásadals kemur 30 ár ov seint. Men gott er so at hann kemur nú.

Sambandsflokkurin tekur undir við einum góðum og miðvísum útjaðaraøkispolitikki. **Sambandspolitikkur:** Í orðsins rætta týdningi er her talan um sambandspolitikk. Tað verður gjørt samband og bøtt um samband ímillum bygdir og oyggjar.

Hesin sambandspolitikkur førir okkum langt fram á menningarleið, til gagn fyri bæði land og fólk. Hesin politikkur kostar. Og hann kostar nógv. Tað hava vit í Sambandsflokkinum ongar trupulleikar av, tí vit kunnu gjalda fyri tað menning, ið er neyðug.

**Tað er ein gáta?**
At sambandsfólk tosa um menning, tað er at skilja. Tí vit kunnu gjalda. Men tað er ein ósvaraður spurningur hjá mær og fleiri, hvussu loysingarfólk ditta sær at tosa um hesar útbyggingar - uttan at rodna. Tí hesar útbyggingar kunnu als ikki gerast, um loysingarætlanin verður framd. Tað eru nevniliga ikki peningur til hesar ætlanir. Um seinasta vanlukkusemjan verður til veruleika, so verður hall á fíggjarlógini um 1 ella 2 ár. Og tá hava slíkar íløgur ongan møguleika at verða framdar.

Treytin fyri at samband kann fremjast er nevniliga Sambandspolitikkur. Tá eru nevniliga fíggarligu viðurskiftini á so høgum støði, at slíkar ætlanir kunnu fremjast í verki. Vit kunnu siga, at *ríkisveitingin enn er garantur fyri, at útbyggingin av hesum landi heldur fram.* Tí skulu vit vera varin við at fremja Tjóðveldispolitikk og loysingarpolitikk. Tá verða nevniliga nógvar broytingar - og bert til tað verra. So einkult er tað.

Latið okkum fremja Sambandspolitikk - og byggja land.

Tað ger loysingarsamgongan innan samferðsluøkið í løtuni. Teir fremja Sambandspolitikk. Teir kunnu ikki lata vera.

## KROSSORÐ



**Vinnari:**

*Dagmar Eyðunsdóttir*
*410 Kollafjørður*

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: SUNDURBROTNIR



**Hvønn fríggjadag**
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. ...« á bjálvan.

**265**

**Loysunarorðið:** ..........................................

Navn: ..........................................................

Bústaður: ....................................................

Bygd/býur: ..................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ❑ **Málløra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***

gult27 cyan27 magenta27 svart27



Vilja tygum við Í Býin
- hvønn hósdag



# Lærlingur til fotodeildina í 3-aranum søkist

Vit bjóða tær eitt spennandi arbeiði við hópin av avbjóðingum í; har tú kemur at arbeiða við øllum ið hugsast kann innan foto/video/ og ikki minst tí nýggju digitalu tøknini.

Vit væntað at tú ert fryntligur, ágrýtin og ikki bangin fyri at arbeiða nógv, tá tað krevst, møtir altíð til tíðina, vælsigneraður við einum smíli og klárur til dagsins uppgávur.

Tú mást hava FHS, lærutíðin er 3 ár, við skúlagongd í DK av og á.
Nærri fæst av vita við at ringja til Gissur á tlf. 316769 ella 213535.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn saman við prógvum og viðmælum til:

3arin ELECTRONIC

Gissur Patursson
Tórugøta 14
FO 100 Tórshavn

3-arin er handil í sms; har starvast 12 fólk; handilin hevur 4 deildir: smykkudeild/fløgudeild/ fotodeild og tøknideild.

# Lærlingur til smykkudeildina í 3-aranum søkist

Vit bjóða tær eitt spennandi arbeiði innan smykkur/prýði/steyp o.l. og alt, ið hoyrir til eina professionella gull/silvur deild. Í deildini starvast 2 urmakarar; ein útlærd innan gull&silvur og eitt hjálparfólk.

Vit væntað at tú ert fryntligur/ ágrýtin og ikki bangin fyri at arbeiða nógv, tá tað krevst, møtir altíð til tíðina, vælsigneraði við einum smíli og klár til dagsins uppgávur.

Tú mast hava FHS, lærutíðin er 3 ár, við skúlagongd í DK av og á.

Nærri fæst at vita við at ringja til Gissur á tlf. 316769 ella 213535.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn við prógvum og viðmælum til

3arin ELECTRONIC

Gissur Patursson
Tórugøta 14
FO 100 Tórshavn

3-arin er handil í sms; har starvast 12 fólk; handilin hevur 4 deildir: smykkudeild/fløgudeild/fotodeild og tøknideild.

# SPINNING AEROBIC

**Byrja 23. apríl**

**Enda 23. juni**

## AEROBIC

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|---|
| 17:15 – 18:30 Aerobic - vand Tórhalla/Kristin | 16:00 – 17:00 Trimmari Tórhalla | 17:15 – 18:15 Low - kvinnur Elsa Maria | 15:00 – 16:00 Trimmari - øll Tórhalla |
| 18:30 – 19:30 Trimmari Kristin/Tórhalla | | | 18:00 – 19:00 Aerobic - byrjarar Elsa Maria |
| 19:30 – 21:00 Trimm & Spinn Ingrid | | 19:30 – 21:00 Trimm & Spinn Kirstin/Tórhalla | 19:00 – 20:15 Stepp & Styrki Kirstin |
| | | 20:00 – 21:00 Aerobic - menn Elsa Maria | |

Komið inn í YNDI og verið væl fyri til summarið. Vit hava sum vanligt nógv ymisk sløg av kropsvenjingum, so sum aerobic, spinning, trimming og step. Venjingarnar hóska væl til hondbóltspælarar, ið júst eru lidnir við kappingina. Tað ber eisini til at biðja um tímar til arbeiðspláss, størri bólkar o.t.

## SPINNING

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Leygardag |
|---|---|---|---|---|
| | 17:00 – 18:00 Spinn øll Ann | | 16:00 - 17:00 Spinn øll Ann | 14:00 - 15:00 Spinn øll Skiftandi venjarar |
| 19:30 – 21:00 Trimm & Spinn Ingrid | 19:00 – 20:00 Spinn vand Eyðun | 19:30 – 21:00 Trimm & Spinn Kirstin/Tórhalla | 17:00 - 18:00 Spinn byrjarar Ann | |



# YNDI

v/ *Elsa Maria Bærentsen*

Tilmelding fer fram í hølum okkara yviri við Strond, mánadagin 9. apríl frá kl. 17.00 - 19.00. Eisini ber til at ringja til okkara.

Tórhalla tlf. 317671
Ann tlf. 421095

Yviri við Strond 21
FO-100 Tórshavn
e-mail: yndi@post.olivant.fo

# Keyp myndir

Nú er møguleiki at keypa myndir sum standa í Sosialinum





Kostnaður pr. stk. fyri litmynd:

| | |
|---|---|
| 10x15 cm. kr. 80,- | 18x24 cm. kr. 150,- |
| 13x18 cm. kr. 100,- | 20x30 cm. kr. 200,- |
| 15x21 cm. kr. 130,- | 30x45 cm. kr. 350,- |

Fyll henda lepan út.
Klipp myndina út og send hana saman við lepanum til Sosialin.

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Blað nr.: ____________

Síða: ____________

Stødd: ____________

Mongd: ____________

Navn: ______________________

Bústaður: ______________________

______________________

Telefon: ______________________